# Fiskiskapurin komandi árini

## Ráðstevna í Norðurlandahúsinum 6. juli 2005

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum og Fiskirannsóknarstovan bjóða við hesum til ráðstevnu og orðaskifti um fiskiskapin undir Føroyum komandi árini.

Tilmælini frá Fiskirannsóknarstovuni og Fiskidaganevndini fyri fiskiárið 2005/06 eru framløgd ávikavist 15. og 25. juni 2005. Á ráðstevnuni verða tilmælini løgd fram og viðgjørd. Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum ynskir í hesum sambandi eitt breitt orðaskifti um tilmælini.

Í altjóða høpi herðast krøvini til, at fiskiskapurin er lívfrøðiliga burðardyggur og tekur vistfrøðilig atlit. Roynt verður at ávirka keyparan í mun til hetta. Á ráðstevnuni fer orðaskiftið at fevna um, hvussu vit troyta føroysku fiskastovnarnar lívfrøðiliga burðardygt við atliti til vistfrøðina.

Fiskiskapurin undir Føroyum hevur seinnu árini verið skipaður við fiskidøgum, og eru bæði vinna og myndugleikar sum heild vælnøgdir við ta skipanina. Pláss er tó altíð fyri ábótum. Tað er ynski landsstýrismansins, at orðaskiftið eisini verður um sjálva skipanina.

Ráðstevnan er opin fyri øllum og kostar 500 kr. fyri hvønn persón.

Tilmelding á tlf. 353900 skjótast til ber. Sólvá Olsen og Hanna Elina Djurhuus taka ímóti tilmeldingum. Peningur fyri luttøku verður at flyta á kontu í Føroya Banka, 6460-100.143.6.

Sosialurin 341800

Skráin er hendan:

| | | |
|---|---|---|
| Kl. 9.00 | Vælkomin og setan | Bjørn Kalsø |
| Kl. 9.10 | Veiðihagtøl í 100 ár | Hjalti í Jákupsstovu |
| Kl. 9.20 | Tilmælið frá Fiskirannsóknarstovuni | Jákup Reinert |
| Kl. 9.50 | Tilmælið frá Fiskidaganevndini | Óli Samró |
| Kl. 10.20 | Kaffi | |
| Kl. 10.40 | Fiskiorkan á Landgrunninum og Føroya Banka | Kristin Rasmussen |
| Kl. 11.00 | Gróður og fiskiskapur | Petur Steingrund og Eilif Gaard |
| Kl. 11.30 | Veiðisetningur - hvat er tað? | J. J. Maguire |
| Kl. 12.00 | Ábit | |
| Kl. 13.00 | Reglan um fyrivarni í fiskiskapi og vistfrøðilig atlit | J. J. Maguire |
| Kl. 13.30 | Hvørji krøv setur marknaðurin? | Meinhard Jacobsen |
| Kl. 14.00 | Fiskidagaskipanin í 9 ár - hvat nú? | Kjartan Hoydal |
| Kl. 14.30 | Kaffi | |
| Kl. 14.50 | Pallborð - orðaskifti | Herálvur Joensen |

Fiskimálaráðið

Fiskirannsóknarstovan

---

## Søkt verður eftir

# røktarstarvsfólkum

## til Heimið á Mýrunum í Runavík

Heimið á Mýrunum er stovnur undir Runavíkar kommunu. Heimið veitir bútilboð til 8 minnisveik fólk. Umstøðurnar á stovninum eru góðar og væl egnaðar til búfólk ið eru minnisveik. Harumframt liggur heimið í vøkrum náttúrulendi beint við Toftavatn.

Leyst at søkja er eitt røktarstarv uppá 0,65, fyri starvsfólk í barnsburðarfarloyvi, at byrja 10. august, umframt eitt fast starv uppá niðursetta tíð, sum reingerðinsfólk, til at byrja 18. juli.

**Krøv til røktarstarvsfólkið:**
- hevur prógv og góðkenning innanfyri sítt fak
- hevur áhuga fyri røkt av minnisveikum fólkum
- hevur hug og hegni at vera um minnisveik fólk
- hevur góð samstarvsevnir
- hevur gott og yvirlit og megnar at skipa dagin eftir tørvinum hjá búfólkinum
- er nýhugsandi og hevur hug og ár ræði at skipa fyri dagligum virksemi fyri tey minnisveiku

**Krøv til reingerðingsfólkið:**
- hevur hug og hegni at vera um minnisveik fólk
- hevur góð samstarvsevnir
- vísir tolsemi fyri búfólkunum
- tekur ábyrgdina av at heimið altíð er reint og snotuligt
- tekur ábyrgdina av at bíleggja alt tilfar, ið brúk er fyri til reingering

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt starvsumhvørvi, har tú kanst gera tína áskoðan galdandi og vera við til at menna umsorgan og røkt
- góða innleiðslu
- undirvísing góðar møguleikar til at brúka tíni skapandi og ígongdsetandi evni
- eitt heimligt og hugnaligt umhvørvi, hvar ið hvør einstakur kann kenna seg væl

Løn og setingartreytir smb. sáttmála ímillum viðkomandi fakfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at tosa við Unn Justinussen, leiðara á tlf. 443065 ella 477080.

Umsókn við avriti av prógvi v.m. skal sendast til:

**Runavíkar Kommuna**
Sosiala deild
Heiðavegur 26, Postbox 139
FO-600 Saltangará

**Umsóknarfreist:** 12 juli kl. 12:00

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 2398,** Sp/f All-Inter, 700 Klaksvík.
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Petur Hans Samson Joensen, á Eiðinum 4, 700 Klaksvík
**Innkomin sum stjóri:** Eivind Jacobsen, 490 Strendur

Skráseting Føroya
tann 21. juni 2005

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 3221,** P/F Salmon Proteins, 470 Eiði.
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Jógvan Emil Nielsen, 350 Vestmanna
**Innkomin sum stjóri:** Annvør Jacobsen, 470 Eiði

Skráseting Føroya
tann 24. juni 2005

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 2,** P/F Dimmalætting, 110 Tórshavn.
**Viðtøkur broyttar:** 04.08.2004
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Kristina Malena Samuelsen, Lítlatrøð 3, 100 Tórshavn (nevndarlimur)

Skráseting Føroya
tann 24. juni 2005

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 5,** P/F Havnar Timburhandil, 110 Tórshavn.
**Stjórn:**
**Innkomin sum stjóri:** Alex Nicolaj Hentze, Sleipnisgøta 18, 100 Tórshavn

Skráseting Føroya
tann 21. juni 2005

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 544,** P/F Smyril-Line, 110 Tórshavn.
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Heðin Klæmint Weihe, Marknagilsvegur 64, 100 Tórshavn (nevndarformaður)
Jens Kári Vilhelm, Gróthúsvegur 19, 188 Hoyvík (nevndarlimur)
Morgan Henderson Goodlad, The Cutts, Trondra, ZE1 0US Scalloway (nevndarlimur)
**Innkomin í nevndina:**
Thomas Magnussen, P. við Steinsgøta 24, 100 Tórshavn (nevndarformaður)
Kristian Edvard Heen, Skákið 9, 100 Tórshavn (nevndarlimur)
Alexander Jamieson Cluness, 5 Twageos Rd., ZE1 0BB Lerwick (nevndarlimur)

Skráseting Føroya
tann 22. juni 2005

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 3121,** P/F Vaðanes, 410 Kollafjørður.
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:**
Thormund Johannesen, Suðuroyarvegur 6, 100 Tórshavn (nevndarlimur)
Jens Kári Vilhelm, Gróthúsvegur 19, 188 Hoyvík (nevndarformaður)
Árni Arge, Torsteinsgøta 2, 188 Hoyvík (nevndarlimur)
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Arnbjørn Svabo Egholm, Lítlatrøð 6, 100 Tórshavn
**Innkomin sum likvidator:** Jógvan Elias Winther Poulsen, Fr. Petersensgøta 9, 100 Tórshavn
**Átekning:** Felagið er tann 21.06.2005 farið í sjálvbodna likvidatión

Skráseting Føroya
tann 24. juni 2005

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 536,** Sp/f Tummas Thomsen, 700 Klaksvík.
**Viðtøkur broyttar:** 14.02.2005
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Jóhan Ólavur Thomsen, 530 Fuglafjørður
**Innkomin sum stjóri:** Jacob Pauli Jacobsen, Klaksvíksvegur 52, 700 Klaksvík
**Innkomin sum stjóri:** Karl Thomsen, Niðan Horn 1, 700 Klaksvík
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av einum stjóra

Skráseting Føroya
tann 22. juni 2005

Kristin Balle

veitst tú ikki tað? Sosialurin

i

Lesið Sosialin -tað loysir seg